# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Jens Dalsgaard 60 ár



Í dag, týsdagin 22. februar, verður Jens Dalsgaard á Glyvrum 60 ár. Hann hevur síðani 1968 verið lærari í kommunalu skúlunum í Runavíkar kommunu.

Jens er ættaður úr Skálavík. Foreldrini vóru Sigrun og Viggo Dalsgaard. Viggo var sonur Axel Valdemar Dalsgaard, handilsmannin á Mølini, og Sunnevu úr Búrði í Skopun.

Jens er elstur av systkjunum. Honum næstur er Bjarni, sum hevur havt handilin á Mølini, og so eru tað Egil, sum býr í Havnini og Sunneva, sum býr í Runavík.

Eftir skúlaárini í Skálavík fór Jens, sum teir flestu í Skálavík fyri sløkum hálvt hundrað árum síðani, til skips. Hann fekk um endan á slupptíðini, tá ið hann var við Godthåb av Tvøroyri, og so var hann messudrongur við Fiskanesi, sum Hvannasundsbrøðurnir og Esmar Fuglø áttu, og sum Poli hjá Mortani førdi.

Eftir at hava verið ein vetur á Føroya Fólkaháskúla, fór Jens á Føroya Læraraskúla, og har leyk hann prógv í 1967. Men hann var ikki heilt liðugur við skipslívið, og longsulin var stórur eftir at uppliva, hvussu tað var aðra staðni í heiminum.

Eftir at hava lokið lærara-prógv sigldi hann eitt skifti úti í verðini - bæði í Fjareystrii og Latínamerika.

Í 1968 gekk Jens lærarastarv í Runavík, og har hevur hann verið síðani. Lærugreinarnar hjá honum hava serliga verið føroyskt, eingilskt og týskt umframt kunningarlærugreinunum. Hann hevur vakið eygað við móðurmálinum, sum hann leggur stóran dent á at læra næmingarnar at nýta nátúrliga og livandi og ikki stirvið og kunstugt. Føroyski dansurin stendur frammarlaga millum áhugamálini, og Jens er limur í Eysturoyar dansifelag. Honum dámar væl at ganga og túrarnir í fjøllunum saman við systkinabarninum Jens Mariusi Dalsgaard hava verið nógvir.

Jens giftist í 1970 við Maritu, sum er dóttur Kate og Ernst Hansen á Toftum. Hon er eisini lærarlærd og er skúlastjóri á Toftum. Marita og Jens eiga trý børn - Trúgva, Høgna og Sigrun. Teir báðir sigla sum yvirmenn við Mærsk, og hon lesur lívfrøði á lærda háskúlanum í Keypmannahavn.

Jens er heimkærur, og hann og Marita hava havt manga løtuna og frítíðina í barnaheiminum og handlinum á Mølini í Skálavík. Hann er nærlagdur og umhugsin í øllum, sum hann fæst við. Javnaðarhugsjónina hevur Jens fingið so at siga við móðurmjólkini, og millum frítíðarítrivini er ikki minst lesnaðurin. Jens er væl inni í bókmentum - heima á landi, teimum norðurlendsku og eisini altjóða bókmentum.

Føðingardagurin varð hildin á Svangaskarði fyri innbodnum næstsíðsta leygarkvøld.

### 100 ára føðingardagur

Sunnudagin 27. februar fyllir Karl Jacob Sigvardsen, Gjógv, 100 ár. Dagurin verður hildin við Gjógv frá kl. 13.30 til 17.00.

### Dagurin

**22. februar. Pætursmessa.** So mætur maður sum apostulin Pætur hevur tveir minningardagar í álmanakkanum, hin er *pætursøka* tann 29. juni.

Søgan um Sankta Pætur, sum stendur við dyr himmiríkis og letur upp og aftur, er komin í av evangelisku frásøgnini í Matt. 16,19 "Eg vil geva tær himmiríks lyklar, og tað, sum tú bindur á jørð, skal vera bundið í himli, og tað, sum tú loysir á jørð, skal vera loyst í himli". Pætur er eftir grikska orðinum petros, sum merkir klettur.

*Jákup Jakobsen varð føddur hendan dagin í 1864.*

Tekniski Skúlin í Tórshavn:

## Seks húsasmiðir fingið prógv



*Fríggjadagin 18. februar 2005 fingu hesir seks húsasmiðirnir prógv á Tekniska Skúlanum í Tórshavn, f.v: Andrias Hansen, Argir, (lærupláss: Finnur Simonsen), Árant Olsen, Leirvík, (lærupláss: Karl Olsen), Bárður Juul Arge Jacobsen, Argir, (lærupláss: S.H. Smið Sp/f), Hans J.G. Thomsen, Syðrugøta, (lærupláss: Svenn Olsen Húsasmið), Høgni Dam, Streymnes, (lærupláss: Bulur Sp/f), Karl Johannesen, Toftir, (lærupláss: Byggivirkið KBH Sp/f).*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

†

Kunngjørt verður fyri ætt og vinum, at okkara kæra mamma, vermamma, omma og langomma

**Margit Dam**
**Húsavík**

andaðist leygardagin 19. februar á Landssjúkrahúsinum, 90 ára gomul.

Jarðarferðin verður úr Húsavíkar kirkju hósdagin 24. februar kl. 12.00.
Sungið verður úr Sálmabókini.

*Vegna tey avvarðandi*

**Jóhanna Sofía, Jens Pauli, Høgni og Súsanna**

†

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum, at

**Esther Hentze**
**Hvalba**

andaðist leygardagin 19. februar, 80 ára gomul.

Jarðarferðin verður úr Hvalbiar kirkju týsdagin 22. februar kl. 13.00.

*Familjunnar vegna*

**Hermund og Jórun**

Tey, ið vilja minnast Esther, kunnu ístaðin lata Hvalbiar kirkju eina peningagávu.